# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

**Dagurin**

**18. januar. Prisca.** Ung genta, sum einaferð í 3. øld verður hálshøgd fyri trúar sakir.

*Gomlu jól enda*, tá ið jóladagur er 6. januar eftir julianska kalendaranum. Dagurin verður eisini róptur *gamli trettandi*. Vilt tú verða ríkur, skal tú gomlu trettandu nátt ganga út og sita á kjørbreyt.

*Magnus Heinason varð hálshøgdur hendan dagin í 1589.*



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

Mourits Clementsen, Tórshavn:

## Nýggj automattænasta á Vestaru Bryggju



*Týsdagin læt Mourits Clementsen upp eina automattænastu á Vestaru Bryggju í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Týsdagin 18. januar læt Mourits Clementsen í Havn upp eina nýggja automattænastu á Vestaru Bryggju í Havn**

Mourits Clementsen hevur keypt kaffivognin frá Kaju Olsen, sum handlaði har til fyri nøkrum mánaðum síðan. Karlot Sømark hevði eisini kaffisølu í somu hølum í mong ár.

Mourits sigur, at nú verður tað ikki kaffi, men tvær sodavatnsautomatir eru settar upp, og frá fyrst í februar kemur eisini ein automat við góðgæti.

Opið er alt samdøgrið, og ein veksliautomat at veksla seðlar til myntir er eisini sett upp.

Nógv fólk arbeiða á økinum við Vestaru Bryggju, men automattænastan er eitt tilboð til øll, sigur Mourits Clementsen.

Havnar leksikon:

## Kommunuskúlin á Vaglinum

Grundarsteinurin til Kommunuskúlan á Vaglinum í Havn varð lagdur 13. desember 1893.

1. oktober 1894 varð skúlin reistur, og 4. august 1895 varð hann vígdur.

Frá 1895 og fram til summarfrítíðina í 1956 helt kommunuskúlin til á Vaglinum.

Tað kostaði 38.000 krónur at byggja skúlan, harav grótarbeiðið kostaði 12.000 krónur.

Innsettu myndirnar eru av byggimeistaranum Jákup Andr. Arge, vanliga nevndur Jampan (1854-1931), og arkitektinum Djóna Isaksen, (í Geil) (1849-1912).

Tey, sum hava okkurt at viðmerkja um hesa myndina, eru vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon 314647/273168.



*Mynd: Føroya Fornminnissavn*